## Miðeystur til Íslands

Tá palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, var í Íslandi í gjár, nevndi íslendski uttanríkisráðharrin, Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, á tíðindafundi, at hon og Abbas høvdu umrøtt møguleikan fyri, at palestinskir og ísraelskir politikarar kunnu brúka Ísland sum fundarstað til friðarsamráðingar. Hon segði tó einki um, hvat palestinski forsetin helt um hugskotið. Í sambandi við fundin tilnevndi Ísland ein serligan sendimann í teimum palestinsku økjunum.



*Saeb Erekat, Mahmoud Abbas og Ingibjörg Sólrún Gísladóttir (Mynd: Morgunblaðið)*

## Útflutningurin minkar

Fyribils tølini fyri januar og februar vísa, at føroyska samfelagið útflutti fyri 233 milliónir minni fyrstu tveir mánaðirnar sammett við 2008. Í hesum tølum er útflutningur av skipum tó ikki íroknaður. Tá hetta verður talt við, er talan um meirútflutning upp á 109 milliónir. Tað er annars bert innan alifisk, at talan er um øktan útflutning. Innan allar aðrar vørubólkar er talan um minking í útflutningsvirðunum, hóast Hagstovan tekur fyrivarni fyri, at tølini ikki eru heilt fullfíggjað. Hartil verður sagt, at útflutningurin av uppisjóvarfiski kann sveiggja nógv mánað fyri mánað, og at fyrilit eigur at verða tikið fyri hesum, tá tølini verða lisin. Fyri uppisjóvarfisk var tlan um minking upp á 112 milliónir krónur fyrstu tveir mánaðirnar í 2008.

# Farex væl koyrandi



*Formaðurin í Sambandsflokkinum, Kaj Leo Johannesen, ein av teimum trimum eigarunum í P/F Farex, hevur eftir øllum at døma ikki tann sama áhugan fyri fínum og dýrum bilum, sum hinir báðir eigararnir í neyðlíðandi fyritøkuni. Hann koyrir í einum Honda-jeepi, ið kostar á leið 350.000 krónur*

**Sjálvt um stórur partur av fiskivinnuni, serliga á landi, er í svárari kreppu, so nýtist hetta ikki at vera nøkur vanlukka fyri eigararnar av fyritøkunum. Teir tríggir, sum eiga fiskasølufyritøkuna Farex – harav ein floksformaður og ein fyrrverandi tingmaður – sum er í álvarsligum gjaldstrupulleikum, koyra í løtuni í persónbilum fyri slakar tvær mió. krónur. Eftir sita starvsfólk, sum kunnu síggja fram til eina uppsøgn, meðan bankar og aðrir kreditorar kunnu rokna við einum tvísifraðum millióntapi**

VIÐMERKING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Sokallaða privata initiativið hevur altíð verið hálovað her á landi, og nógvar góðar eru orsøkir til tess. Útyvir at skapa virksemi, virðir og arbeiði til túsundtals fólk, so gevur tað oftani stórt fíggjarligt rásarúm fyri eigararnar – eisini privat – at stovna egna fyritøku. Og fyri tað um fyritøkan ikki gongur av tí besta, fyri ikki at siga, heilt illa, nýtist hetta ikki at merkja tann stóra undirgangin á privata frontinum. Í mongum førum heldur tvørturímóti, freistast ein til at siga.

Tak nú fiskasølufyritøkuna Farex, sum er í vanda fyri at fara av knóranum fyrsta dagin. Hóast stórt hall í rakstrinum, gjaldføristrupulleikar, út ímóti 40 mió. krónur í skuld og við einum virksemi, sum í veruleikanum er steðgað, so koyra teir tríggir eigararnir, Kaj Leo Johannesen, Kári Danielsen og Rói Egholm, í persónbilum fyri slakar tvær mió. krónur. Viðmerkjast skal, at her er stórur innanhýsis munur á bilunum. Meðan floksformaðurin hjá Sambandsflokkinum koyrir runt í einum Honda jeep, hava hinir báðir keypt »rættiligar« bilar.

Bilurin hjá Kaj Leo Johannesen kostar »bert« á leið 350.000 krónur. Øðrvísi er hjá Kára Danielsen, ið koyrir í einum Mercedes ML, sum kostar á leið 750.000 krónur, men ongin slær tó fyrrverandi tingmannin hjá Tjóðveldinum, Róa Egholm. Í løtuni hevur stjórin í Farex ein BMW X3 fyri á leið 770.000, men hesin er eftir øllum at døma ov gamal (keyptur í 2006) ella ov keðiligur hjá fiskasølustjóranum at koyra í. Tí úti á eini bilasølu við Marknagilsvegin stendur ein spildurnýggjur BMW X5, ið kostar á leið 1,1 mió. krónur, tá pláturnar eru fingnar til vega. Skal tað vera, so lat tað vera, hevur Rói Egholm helst hugsað, tá